## Yvir 100 túsund viðjaðu



Fyrireikararnir av Copenhagen Motor Show 2004 høvdu væntað umleið 150 túsund vitjandi til framsýningina, tí fyri fýra árum síðan, tá framsýningin var seinast, vóru 135 túsund vitjandi. Í ár varð talið 102 túsund. Góða veðrið í vikuskiftunum kann hava verið ein av orsøkunum

*Kelda: Motor Magasinet*

## Nissan x-Trail



Lesarar av størsta off-road blaðnum í Týsklandi "Alles Allrad" hava kosið Nissan x-Trail sum vinnara í bólkinum, "Kompaktir SUV". x-Trail er nýliga broyttur nakað, og dieselmotorurin sum fyrr gav 116 hk gevur nú 136 hk. Bilurin fæst eisini við 2,5 litur bensinmotori við 165 hk

*Kelda: P/F Meinhardt Arge*

## Kvinnur spenna beltið



Ein svensk kanning hjá NTF (Nationalforeningen For Trafiksåkerhetens Fråmjande) í Svøríki vísir, at kvinnur eru mundandi betur til at brúka trygdarbeltið enn menn. Um menninir brúktu beltini eins nógv og kvinnurnar, høvdu við bjargað umleið 10-15 mannalívum um árið, sigur Gunnar Carlsson, ferðslutrygdarstjóri hjá NTF

*Kelda: NTF-Tidning*

# Peugeot 307 facelift í 2005



*Teldudesign av nýggja Peupeot 307, sum kemur at síggja nakað soleiðis út við stórum kølaragittari undir kúfangaranum*

*Kelda: FDM / Motor*

**Peugeot 307, sum kom á marknaðin í 2001, fær helst eina "facelift" í 2005. Bilurin fær tá kapping innan fyri familjuna av Citroën C4. Framman kemur bilurin at minna nakað um nýggja Peugeot 407**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Síðan Peugeot 307 kom á marknaðin í 2001, hevur hann staðið seg væl í hørðu kappingini í sokallaða Golf-klassanum. Bilurin verður gjørdur sum hatchback, stationcar, SW og CC (Coupé Cabriolet).

Umframt uttaru broytingarnar kemur eisini nýggj ljóstøkni við dioduljósum, og á trygdarøkinum fær hann eisini knæ-airbag, sum er standard á 407.

Føroya MC-Boogie :

# Stórt motorsúkklutiltak seinasta leygardag



*Motorsúkklurnar á veg inn á Shell-støðina í Gøtudali, har ymisk tiltøk vóru*

**Leygardagin 1. mai varð skipað fyri stóra tiltakinum fyri motorsúkkluáhugað, Føroya MC-Boogie. Tað eru Føroya-MC og Føroya Ellisakfør, sum skiftast um at skipa fyri, og leygardagin var tað Føroya-MC, sum skipaði fyri**

MC-TREFF

Nógvar motorsúkklur vóru at síggja seinasta leygardag. Tær hittust á Shellstøðini við Ringvegin í Havn leygarmorgunin 1. mai til kaffi og okkurt afturvið. Síðan varð koyrt runt í Havnini og inn í Eysturoynna, har steðgað varð ymsastaðni, áðrenn komið var til Shell-støðina í Gøtudali kl 14:30. Har var ein steðgur til kaffi og køkur, togtogan og onnur tiltøk. Shell er høvuðsstuðul hjá Føroya-MC.

Síðani varð koyrt til Havnar – tiltakið endaði við einum góðum døgurða í Kagganum um kvøldið, fyri tey sum høvdu teknað seg.

.



UTTAN ÚR HEIMI

# Ísrael – tað duldarfulla kjarnorkuveldið



*Herfyri var ísraelski kjarnorkuteknikarin Mordechai Vanunu latin leysur eftir at hava sitið 17 ár í fongsli, og tað hevur aftur elvt til orðaskifti um tey ísraelsku kjarnorkuvápnini*

*Mynd: Reuters*

**Hóast tað hevur verið eitt alment loyndarmál í næstan 30 ár, at Ísrael hevur kjarnorkuvápn, verður landið framvegis ikki roknað ímillum kjarnorkuveldini**

LOYNDARMÁL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Nevnir tú spurningin um kjarnorkuvápnini fyri einum ísraelskum diplomati, svarar hann tær við einum lítlum yvirberandi brosi ella við einum steinrunnum andlitsbráði. Síðani svarar hann spakuliga við tí vanliga ísraelska svarinum, at "Ísrael verður ikki tað fyrsta landið í Miðeystri, sum kemur við kjarnorkuvápnum."

Ísraelsmenn hava ongantíð útgreinað, hvat liggur í orðunum "kemur við kjarnorkuvápnum", men tey umfata í hvussu er ikki tað at gera kjarnorkuvápn. Í veruleikanum fóru ísraelsmenn undir at útvega sær kjarnorkuvápn, longu stutt eftir at ísraelska ríkið varð skipað í 1948. Við hjálp úr Fraklandi vóru tey fyrstu vápnini klár undir Seksdagakrígnum í 1967, og síðani sjeytiárini hevur tað verið eitt alment loyndarmál, at Ísrael er eitt kjarnorkuveldi. Tað vita bæði vinir og fíggindar.

### Vanunu

Herfyri var ísraelski kjarnorkuteknikarin Mordechai Vanunu latin leysur eftir at hava sitið 17 ár í fongsli, og tað hevur aftur elvt til orðaskifti um tey ísraelsku kjarnorkuvápnini. Tað var Vanunu, sum í 1986 greiddi bretska blaðnum Sunday Times frá teimum ísraelsku kjarnorkuvápnunum. Hann lat eisini blaðið fáa myndir og tekningar av tí sera loyniliga reaktorverkinum uttan fyri býin Dimona í Negev-oyðimørkini.

Við myndunum hjá Vanunu og einum ótali av fylgisveinamyndum sum grundarlagi halda serfrøðingar, at Ísrael hevur ímillum 70 og 400 kjarnorkuvápn í dag, men teir flestu halda, at tað rætta talið er einastaðni ímillum 100 og 200. Allar bumburnar eru gjørdar á verkinum í Negev-oyðimørkini.

Ísrael hevur ikki bara kjarnorkubumbur, men landið er eisini ført fyri at nýta tær í øllum Miðeystri og aðrastaðni við. Av jørðini kunnu teir skjóta bumburnar við rakettum av sløgunum Jericho I og Jericho II, sum bera ávikavist 1200 og 1800 kilometrar. Í luftini kunnu flogfør av sløgunum F15 og F16, ið kunnu flúgva upp í 4500 kilometrar, taka bumburnar við sær, og harafturat hevur Ísrael tríggjar nútímans kavbátar av slagnum Dolphin, sum eru útgjørdir til at skjóta rakettir við kjarnorkubumbum.

Tað er ikki greitt, um Ísrael nakrantíð hevur roynt sínar kjarnorkubumbur, men serfrøðingar halda, at ein roynd varð gjørd langt uppi í atmosferuni uppi yvir Suðurafrika í 1979. Hetta var ein felags ísraelsk-suðurafrikonsk verkætlan, men tað finnast eisini óváttaðar frásagnir um royndarspreingingar í sjálvum Ísrael.

### Fyri og ímóti

Tey, sum halda tað vera rætt av Ísrael at fáa sær kjarnorkuvápn, halda hesi vápnini hava avgerandi týdning fyri landið, tí tey tryggja, at teir arabisku fíggindarnir tora ikki at royna at reka Ísrael í havið. Tey vilja vera við, at júst kjarnorkuvápnini vóru orsøkin til, at Egyptaland og Sýrialand nýttu ikki alla sína hermegi, tá tey lupu á Ísrael í 1973, og at tey vóru medvirkandi til, at Egyptaland seks ár seinni gekk við til at ein friðarsáttmála. Eftir teirra tykki vóru tað eisini kjarnorkuvápnini, sum ræddu Saddam Hussein frá at løða sínar Scud-rakettir við evnafrøðiligum ella lívfrøðiligum vápnum, tá Irak sendi eina røð av hesum rakettum inn yvir Ísrael undir Flógvakrígnum í 1991.

Tey, sum eru ímóti kjarnorkuvápnunum, vilja vera við, at vápnini elva til støðugan spenning í økinum. Eftir teirra tykki kann hetta hava við sær, at Iran og kanska eisini Saudiarabia og Egyptaland fara at útvega sær kjarnorkuvápn. Og so vísa tey eisini á tann vesturlendska dupultmoralin, sum sigur, at Irak, Iran og Norðurkorea mugu ikki fáa sær hópoyðingarvápn, meðan einki verður gjørt burtur úr teimum ísraelsku hópoyðingarvápnunum.

Tá Libya í desember í fjør kunngjørdi, at landið hevði slept sínum ætlanum um hópoyðingarvápn, kravdu Egyptaland og Sýrialand, at Ísrael skuldi gera tað sama, men svarið úr Jerusalem var eitt greitt nei. USA og Bretland svaraðu eisini á ein hátt, sum gav Ísrael loyvi at varðveita sína støðu. Sum bretski uttanríkisráðharrin, Jack Straw, segði:

– Arabararnir eiga at viðurkenna tað ísraelska ríkið og at gevast við hóttanunum ímóti tí. Júst teirra hóttanir seta Ísrael í eina serstøðu, hvat trygd viðvíkir.

### Áttu at sagt tað

Ísraelski granskarin og rithøvundurin Avner Cohen, sum arbeiðir á lærda háskúlanum í Maryland í USA, heldur, at Ísrael eigur alment at viðurkenna, at landið hevur kjarnorkuvápn.

Cohen verður mettur at hava góðan kunnleika til tey ísraelsku kjarnorkuvápnini, og hesi viðurskifti lýsti hann í bókini "Ísrael og bumban", sum kom út fyri nøkrum árum síðani. Nú hevur hann skrivað bókina "Ísrael og tað seinasta loyndarmálið". Hon er kortini ikki komin út í Ísrael, har myndugleikarnir hava havt hana til kanningar í níggju mánaðir.

Avner Cohen sigur, at Ísrael eigur at gera sum India og Pakistan og kunngera, at landið hevur kjarnorkuvápn. Hann sigur, at tað var skilagott av Ísrael at dylja sannleikan fyri 30 árum síðani, men tað er einki grundarlag fyri at hava somu støðu í dag, sigur hann.

Avner Cohen vísir á, at í dag hevur Ísrael gagn av altjóða sáttmálanum ímóti útbreiðslu av kjarnorkuvápnum, og at landið tí átti at staðfest sáttmálan. Tað hava hvørki Ísrael, India ella Pakistan gjørt.

*(Kelda: Jyllandsposten)*